Jákup Andreas og sandurin í Sandágerði:

# Ábøtur mugu gerast í Sandágerði











**Havnin tekur lættliga eini 500 - 600 hval, sigur grindaformaðurin í Havn í eini 22 ár, Jákup Andreas Mohr. Men ábøtur krevjast í Sandágerði, ásannar grindaformaðurin enn einaferð eftir eina stóra grind, og eftir at hann í áravís hevur biðið um sand eystarumegin í Sandagerði. Bert tveir bólkar vórðu hildnir til, men tað kókaði eystanfyri Nólsoynna, so hví ikki samskipa betur, so okkurt fer norðureftir, tá vit í dag hava góðar bátar**



GRINDADRÁP
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*
*Myndir: Jan Muller*

Ein hin størsta grindin í áravís í Havn legði beinini í Sandagerði herfyri. Sum nakað forkunnugt í Havn varð eisini býtt í heimapartar, og fólk kundu fara á bryggjuna at fáa sær eitt kók. Ikki bert grindamenn - og kanska manning á heldur fullum rakstrarbátum - fingu part. Fólk løgdust ikki á boðini, men ríkiligt var til, so har var ongin trupulleiki.

Ein, ið hevur verið grindamaður í Havn í mong ár, er Jákup Andreas Mohr. Í eini 55 ár hevur hann róð og siglt í grind og spurningar viðvíkjandi grind hava altíð havt hansara stóra áhuga. Í 1982 gjørdist hann grindaformaður.

## Fleiri bólkar

Vit hava hitt Jákup Andreas á máli um ymsar grindaspurningar. Og hann er fúsur at svara.

- Tað var fínt, at tú ringdi. Kanst tú ikki bara koma út her, so vit kunnu práta, tí eg havi nevniliga okkurt, ið eg fegin vil siga, sigur Jákup Andreas, tá vit ringja, so vit leggja leiðina framvið.

– Av og á eru altíð ein ørgrynna av grind eystanfyri Nólsoynna. Hendan morgunin, 9. oktober, tá eg kom til finningarbátin, vóru so nógvir bólkar, at mær kom til hugs, at tað var sum at koma til eitt ovurstórt sjálvtøkuborð, sigur Jákup Andreas, meðan hann skeinkir ein kaffimunn.

– Tá vit avlívaðu í Sandagerði vóru bara tveir bólkar av øllum teim mongu, sigur Jákup Andreas um grininda leygardagin, ið var 244 hval.

## Biðið um sand

Fleiri undrast á klettarnar eystarumegin í Sandagerði og meta, at teir kanska áttu at verið burturbeindir. Men har kemur sovorðið sum friðing upp í leikin.

– Eg havi í áravís biðið um at fáa nakrar lastir av sandi eystarumegin í Sandagerði. Og tað hendi, sum eg óttaðist fyri; grindin kom í høvuðsheitum inn eystantil, og hevði sandur verið lagdur út, hevði dráp~ið gingið nógv skjótari og betur.

– Verður sandur lagdur har, tekur vágin óivað grind á 500 - 600 hval, sigur Jákup Andreas Mohr, sum metir, at klettarnir gera onki, um bert sandur verður lagdur út.

## Býta til onnur øki

Sum heild metir Jákup Andreas, at rætt er at býta við onnur, um stór grind kemur á Havnina.

– Kemur stór grind er ikki óhugsandi, at ikki bara Havnin fær heimapartar, men møguliga eisini miðøkið í Eysturoynni og onnur øki, ið mangla grind, sigur grindaformaðurin tey seinastu 22 árini.

– Væl var sjógvað henda dagin, og var væl samskipað, so kundu 2 til 3 góðir rakstrarbátar farið við tveimum bólkum norð í Sund og møguliga 2 til 3 norð á Gøtusand við tveimum bólkum, sigur Jákup Andreas, ið minnir á, at ofta er ørgrynna av hvali eystanfyri Nólsoynna.

## Spikafeit grind

– Grindin var feit, og hvør hvalur var spikafeitur, og tílík grind hevur millióna-virði í kjøtprísi. Tað er tí mín inniliga áheitan at fáa meira sand, so vit kunnu taka ímóti stórum tali, mongum umdømum til gagns, sigur Jákup Andreas.





Raske drenge, grind at dræbe. Soleiðis verður kvøðið í Grindavísuni hjá Pløyen. Og Jákup Andreas metir vón verða fyri framman, tí unga ættarliðið bæði dugir og tímir.

– Teir eru óførir. Duga væl og arbeiða skjótt og eru sera dugnaligir, heldur grindaformaðurin um unga grindafólkið. Og skipanin við heimapørtum riggaði sera væl, leggur hann afturat.

Ikki vil hann fara út í æsir við øllum, og at tosa við útlendskar fjølmiðlar er hann givin við, illa royndur sum hann er av hesum.

Tá vit fara niður trappurnar, biður hann tygara útsenda koma inn í kjallaran at skoða framkomnu útgerðina, ið er við til at fáa grindina til høldar. Ein stór sag og ein vakumpakkimaskina. Og innan útsendi blaðmaðurin setir seg í bilin, hevur Jákup Andreas syrgt fyri, at eisini blaðmaðurin hevur fingið part, tí 3 lykkjur og vakumpakkaðar spikfjósir liggja á dúrkinum, tá leiðin aftur gongur úr túninum hjá Jákup Andreasi.




# Rúsevna ráðstevna

28. oktober 2004 í Norðurlandahúsinum

Bláí Krossur vil við hesum bjóða til eina Rúsevnaráðstevnu í Norðurlandahúsinum um evnið: **"Hvussu hjálpa vit rúsmisnýtarum best?"**

Fimm fyrilestrahaldarar, ið á ymiskan hátt arbeiða við hesum trupulleika, fara at siga sína hugsan um hetta evnið.

**Lars Emil Johansen**, fólkatingslimur úr Grønlandi, kemur at greiða frá sínum lívi við og uttan rúsdrekka. Eisini vil hann lýsa trupulleikan í Grønlandi, og hvat verður gjørt fyri at loysa hann.

**Thomas Lundqvist** úr Svøríki, sum dagliga arbeiðir við at hjálpa ungum rúsevnismisnýtarum, fer at greiða frá, hvussu sviar royna at hjálpa hesum ungu burtur úr trupulleikanum.

**Hans Pauli Strøm** landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, og **Karin Kjølbro**, leiðari á Kriminalforsorgini, fara at greiða frá, hvussu tey síggja trupulleikan í Føroyum, og hvussu vit frá politiskari síðu fáa sum mest burtur úr, tá talan er um at hjálpa rúsmisnýtarum.

**Geir Gundersen** úr Noregi, sum í juli varð valdur til nýggjan formann í Altjóða Bláa Krossi, fer at greiða frá, hvussu rústrupulleikin sær út í altjóða høpi, og hvussu hann metir, at vit best fáa loyst trupulleikan í framtíðini.



Hans Pauli Strøm | Karin Kjølbro | Thomas Lundqvist | Lars Emil Johansen | Geir Gundersen

KREA.FO · TEL 44 93 39

Dagfesting
Hósdagin 28. oktober 2004.
Ráðstevnan byrjar kl. 09.00 og endar uml. kl. 16.00.

Bindandi fráboðan seinast
Hósdagin 21. oktober 2004.

Spurningar/ivamál
Setið tykkum í samband við skrivstovuna á telefon 44 93 43 ella sendið ein teldupost til jl@blakross.fo

Fráboðan um luttøku gerst við at senda eitt t-bræv til jl@blakross.fo. Her skal skrivast navn á stovni/virki, navnalisti og t-bræv adressa hjá øllum á listanum. Ella klipp lepan av og send hann á faks nr. 44 93 53, ella til Bláa Kross Føroya, Glyvravegur, 625 Glyvrar.
Í sambandi við tilmelding, vinarliga flytið luttøkugjaldið (á 500 kr. pr. luttakara) á konto 9181-495.393.4 og viðmerkið "Rúsevna ráðstevna".
Íroknað prísin er kostur.

Virki/stovnur: ____________________

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Bygd/býur: ____________________ t-post adr.: ____________________